# SPYRST SO LIVST

RIGMOR DAM

Tríbarnamamma, kona, lærari, journalistur og redaktørur á lívsstílsblaðnum *Rákið* svarar spurningum til brævkassan **SPYRST SO LIVST**



*Redaktiónin loyvir sær at velja og vraka millum innsendu spurningarnar*

Hevur tú brúk fyri einum góðum ráði, so send spurningin til:
Sosialurin
SPYRST SO LIVST
postboks 76
FO-100 Tórshavn
**ella teldupost til rigmor@sosialurin.fo**

## Grannabørnini eru altíð hjá okkum

**Góða Rigmor**

*Eg havi illgruna um, at børnini í grannahúsinum hjá okkum, ikki hava tað so gott, sum tey áttu. Ikki tí, foreldrini virka bæði blíð og fitt, men børnini, sum eru seks og átta ára gomul ansa fyri tað mesta sær sjálvum. Eftirhondini eru tey faktisk eisini meira inni hjá okkum saman við okkara børnum enn heima hjá sær sjálvum. Ofta blívur klokkan 11 um kvøldi, uttan at foreldrini ringja og spyrja eftir teimum. Fyri tað mesta má eg sjálv siga vit tey, at nú er best, at tey fara heim. Tey eru eisini altíð svong, tá tey eru her, og tey eta sum oftast nátturða saman við okkum. Nú leingist eg satt at siga eftir einari løtu, har tey ikki eru gestir her í húsinum ella við borðið, men eg veit ikki, hvønn eg skal siga hetta við ella hvat eg skal siga.*

***Ein mamma***

**Góða mamma**

Hasi børnini eru alt ov ung at ganga úti hjá fólki og mala til út ímóti midnátt. Tí hevði rættast verið, at tú setti teg í samband við myndugleikarnar.
Torir tú ikki tað, mást tú antin senda grannafólkunum eina rokning fyri pleygu, ella taka sakina í egnar hendur.

Eg skilji als ikki, at tú lovar børnunum at vera so nógv og leingi heima hjá tykkum. Heldur ikki skilji eg, at tú bjóðar teimum at eta við hvørt kvøld. Tú ert vaksin, og skalt seta mørk fyri børnum. Bæði egnum børnum, gestabørnum og børnum, sum hava brúk fyri hjálp.

Tá tit fara til borðs, skalt tú, ella maður tín, fylgja gestabørnunum heim til sín sjálvs at eta. Sig við foreldrini, at nú eru »Óli og Anna« svong, og nú fara tit at eta heima hjá tykkum. Ger tað nakrar ferðir, til foreldrini hava fangað boðskapin.

Um børnini koma aftur til tykkara at spæla aftan á nátturða, skulu tit gera tað sama, tá tykkara børn fara í song um 8-9 tíðina – tí tá skulu børn í song gerandisdagar!

Fylg teimum heim og sig við foreldrini, at nú eru »Óli og Anna« móð, og nú fara tykkara børn í song. Ger eisini hetta nakrar ferðir, til foreldrini hava fangað boðskapin.

Góða eydnu

***v. rigmor***

## Menn, sum pissa skeivt

**Hey Rigmor**

*Fleiri ferðir havi eg upplivað á arbeiðsplássum, har eg vaski, at menn pissa á gólvið við síðuna av kummuni. Kunnu teir ikki gera við tað? Tað er barasta so ólekkurt, tí deymurin setur seg í fuguna, og eg troysti mær so illa at turka tað upp.*

***Heilsan vaskikonan***

**Góða vaskikonan**

Ja, taðvadenn – eg skilji tað heldur ikki. Teir mugu vera skeivir ella okkurt sovorðið ☺

Onkur hevur sagt, at tað hjálpir at leggja ein borðtennisbólt niður í vatnið í kummuni. So royna teir at raka bóltin, í staðin fyri kantin. Kanska tú kundi roynt tað.

Eg rokni ikki við, at tað rínur við, um tú hongur eina súra áminning á veggin. Heldur ikki kanst tú forlanga, at teir sita og pissa, tað er líkasum at taka eitt sindur av glansinum frá teimum.

Annars havi eg lisið onkrastaðni, at tað eru nógv fleiri vandamiklar bakteriur á konufólkavesinum enn á mannfólkavesinum. Um tað er tí, at bakteriurnar doyggja av stankinum á mannfólkavesinum sigur søgan onki um.

Men royn hatta við borðtennisbóltinum – mannfólk eru jú tíbetur spælibørn alt lívið ☺

***v. rigmor***

## Hann fekk gron undir shopping

**Góða Rigmor**

*Eg eri djúpt frusterað. Eg og maðurin eru júst komin heim av uttanlandsferð. Á ferðini vóru vit eisini í fleiri stórum sølumiðstøðum, men kortini havi eg næstan onki keypt. Maðurin hatar at ganga í handlum og keypa – og eg elski tað. Hetta hevur elvt til frustratiónir og klandur okkara millum alt vikuskiftið. Og tað situr í mær enn, nú fleiri dagar seinni. Eg haldi, at maðurin hevði kunna latið meg gingið í handlum nakrar tímar, so hevði eg verið glað. Nú eri eg bara kedd. Børnini eru lítil, at tey tíma heldur ikki at vera við í handlum. Eri eg ein egoistur, sum vil hava nakrar tímar í frið at gera tað, sum eg elski?*

***Heilsan ein kedd kona***

**Góða kedda kona**

Nei, tú ert absolutt ikki nakar egoistur. Tú ert púra normal. Tí næstan allar konur elska at shoppa eitt sindur, tá tær eru uttanlands. Og allar konur hata at hava ein súran mann við upp á sleip. So sjálvandi ert tú vónbrotin av, at maðurin ikki bara kundi taka hasi børnini onkra aðrastaðni í nakrar tímar, so tú kundi fáa frið.

Tú mást taka hann til viks og fortelja honum varliga, hvussu tað kennist. Ikki døma hann, tí so verður tað bara verri. Sig, hvønn týdning tað hevur fyri teg, og spyr hann, hvussu hann heldur, at tit kunnu forða einari endurtøku eina aðru ferð. Tí hann ynskir heilt sikkurt heldur ikki at særa teg.

***v. rigmor***

---

Málstrikan MÁLFELAGIÐ

# Tað eitur Chile

Nú skal alt skifta navn: Akstovan, Posta, Mest, Mess, Fast, Last og Brast. Hvat skal hetta til? Og herferðin móti staðanøvnum heldur fram. Stockholm verður eyknevndur Stokkhólmur. Hvussu skal Bornholm so eita? Trollhättan má so eita Trøllahettan. Tann koreanska hálvoyggin er blivin til Koreanesið, og hálvoyggin Krim verður kallað Krimnesið, hóast hon líkist øllum øðrum enn einum nesi.

Eisini stavingin verður broytt – og ofta til tað ókenniliga. Vit hava í nøkur hundrað ár havt eitt land í Suðuramerika, sum eitur Chile. Tað var har, at USA-stuðlaðir fascistar tóku ræðið í 1973, og í 1647 var ein av heimsins allarringastu jarðskjálvtum har. Har var ikki steinur eftir á steini í høvuðsstaðnum Santiago. Føroyingar byggja skip í Chile, og vit kappast við chilenarar um laksaaling.

Vit kenna væl hetta heita landið í tí spansktalandi Amerika. Men nú verður landið knappliga stavað KILI. Eisini av Sosialinum. Hví? Er tann føroyska stavifløkjan ikki nóg stór? Hava vit brúk fyri størri óklárheit? Hava vit brúk fyri einum babyloniskum hurlivasa í staving?

Tað er vælkend psykologi, at vit uppfata orð sum heildir, ikki sum einstakar bókstavir. Tá ið ein føroyskur sjómaður hoyrið navnið *Aberdeen*, so hevur hetta heilt klárar associatiónir, kanska góð minnir, sum bara verða órógvað av *Apardín*, sum onkur kundi funnið upp á at kallað býin.

Av órannsakiligum orsøkum verða íslendsk staðaøvn ikki broytt í tí føroyska atlassinum. Hví man tað vera? Vit eiga at lata onnur fáa sama rætt. Brúka tey nøvn, sum fólk á staðnum brúka. Tað eru internationalir specialistar samdir um: Altso: CHILE. (MT)